# Edvard Fuglø í góðum selskapi



*Edvard Fuglø er við á eksklusivari framsýning í Svøríki í summar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Listamaðurin úr Klaksvík sýnir fram á stórari framsýning í Svøríki, og fyrsta myndarøðin varð seld beinanvegin**

LIST
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Edvard Fuglø er ein av teimum útvaldu til summarframsýningina á Steninge slotti í Svøríki. Hetta er ein stór summarframsýning, sum bert úrvaldir listamenn sleppa við til.

Saman við Yrjø Edelmann úr Svøríki, Anssi Tørrønen úr Finlandi, Gudrun Kristjansdóttir úr Íslandi, Jan Wessel úr Danmark og Victor Sparre úr Noregi mannar Edvard Fuglø stóru árligu framsýningina í Steninge.

– Hendan framsýningin hevur nógv at siga fyri meg, tí helst fara millum 400.000 og 500.000 fólk at síggja verkini hjá mær á framsýningini, sigur Edvard Fuglø.

Fyrst í komandi ári flytir framsýningin til Hadeland Glassverk í Noregi.

### Seldi beinanvegin

Edvard hevur 20 málningar við á framsýningini, og ein av hansara myndum er vorðin ímyndin av hesi summarframsýningini.

Ein av málningunum úr røðini Northatlantic Cosmopolitans prýðir kápu, postkort og alt annað tilfar, sum er gjørt í sambandi við framsýningina.

Røðin, sum umfatar seks málningar, varð seld, beinanvegin tá framsýningin lat upp 9. juni.

– Hetta er fyrstu ferð, at eg eri við á eini so stórari framsýning, sigur Edvard Fuglø.

Tey, sum standa fyri framsýningini í Steninge, fingu Edvard viðmældan úr Íslandi, og eftir at hava sæð onkur verk hjá honum, vildu tey hava hann á stóru framsýningina.

Framsýningin í Steninge er opin til 28. oktober.




*Ein av málningunum hjá Edvardi Fuglø er vorðin ímyndin av summarframsýningini í Steninge*

## Golfstreymurin viknar

**Golfstreymurin, sum alt tað vit vita, hevur havt alstóran týdning fyri Føroyar og lívið á við Føroyar, er munandi viknaður helst orsakað av CO2-útláti og vandi er fyri, at havið kring Føroyar verður kaldari sum frálíður. Tað kann raka fiskastovnarnar.**

ÁVARINGARKLOKKUR VIÐ FØROYAR
*Jan Müller*

Hetta vísir kanning, sum føroyskir granskararar hava gjørt saman við granskarum á lærda háskúlanum í Bergen og úr Skotlandi hava gjørt og sum varð kunngjørd í gjár í heimskenda tíðarritinum »Nature«. Granskararnir hava funnið fram til at streymurin av køldum vatni suðureftir úr Norskahavinum er minkaður við 25% seinastu 50 árini. Her er serstakliga talan um Føroyabanka-rennuna sunnan fyri Føroyar, sum er ein av týdningarmestu flutningsleiðunum hjá hesum sjógvi. Tað er hesin áhaldandi streymur (transportur) av sjógvi, sum er mest týðandi motorurin í Golfstreyminum, ið flytur heitan sjógv upp gjøgnum Norðuratlantshavið og sum harvið er við til at tryggja tað sera milda veðurlagið í okkara parti av heiminum. Hetta er fyrstu ferð, at tað verður prógvað, at stóru havstreymarnir í Atlantshavinum er vornir munandi veikari skrivar norska blaðið Bergens Tidende.

Granskarar, sum hava kannað árinini av økta CO2-útlátinum, hava leingi gitt, at vakstrarhúsárinið fór at ávirka Golfstreymin. Granskararnir eru nærum vísir í, at CO2 útlátið er orsøkin til, at Golfstreymurin er við at steðga upp og halda, at minkingin hevur verið umleið 6% seinastu 50 árini.

# Statoil og BP borð um borð undan boring

**Tað kann væl henda, at bæði oljufeløgini seta borarnar í undirgrundina um somu tíð – um miðjan juli**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað verður um reppið, hvør verður fyrstur at seta borin í føroysku undirgrundina, norska oljufelagið Statoil ella bretska BP. Nú tað nærkast endanum á drúgvu fyrireikingunum til fyrstu oljuleiting í føroyskari søgu fylgjast stóru oljufeløgini Statoil og BP borð um borð.

Tað hevur ljóðað, at Statoil skuldi vera klárt 1. juli men hetta verður helst seinkað nakað, soleiðis at tað verður útskotið í eina ella kanska tvær vikur, tvs. til inn í juli mánað. Pallurin Sovereign Exploerer borar framvegis vestan fyri Írland. Og hendir tað, at olja verður funnin har, so kann tað taka longri tíð at gera klárt til boringina her um leiðir. Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil sigur seg vóna, at boringin kann byrja eina viku inn í juli. Fyri teir hevur tað tó einki at týða, um boringin byrjar nakað seinni enn upprunaliga ætlað. Ikki annað enn at Amerada Hess skal brúka pallin, tá Statoil er liðugt við hann.

Hjá BP tykist tað haraftúrímóti at ganga hinvegin. Har røkist fyri, at boriskipið West Navion verður kanska longu í føroyskum sjógvi um miðjan juli og onkur hevur nevnt 8. juli. Annars varð tann boringin sett til at byrja um ólavsøkutíð. Nógv kundi tí bent á, at Statoil og BP seta borarnar í undirgrundina umleið sama mundið miðskeiðis í juli ella so. Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP sigur, at tað skuldi sæð gott út við boriskipinum, og at tað kann vera her um miðjan juli.

Meðan Statoil skal bora í einar 78 dagar, so fer boringin hjá BP at taka nógv stytri tíð. Hetta m.a. tí at boriskipið er útgjørt við tveimum borisektiónum.



*Frá vitjanini umborð á Sovereign Explorer í írskum sjógvi. Vinstrumegin stjórin í Statoil, Rúni Hansen og norski boristjórin, sum skal taka sær av boringini við Føroyar.*